tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Strandferðslan og kundaupplýsing

## *Oddagrein*

TAÐ fer ikki dagur, at Strandferðslan ikki fær toyggið. Er tað ikki tingmaður, sum er ónøgdur við ferðaætlanina, so eru tað borgarar, sum hava okkurt at fýlast á. Hetta er bara so. Nú er júst Strandferðslan ein so týðandi stovnur, at tað slepst ikki undan at standa fyri skotum. Tí hetta at skula veita eina góða og trygga tænastu til allar landsins borgarar hvønn dag í árinum er eingin løtt uppgáva. At politikarar so eisini oftani seta stovninum órímulig krøv ger ikki støðuna lættari. Soeliðis sum land okkara er háttað við nógvum oyggjum og bygdum er innanoyggja samferðslukervið ein av grundarsteinunum fyri lívi og menning. Og her hevur Strandferðslan ein týðandi leiklut, ja so avgerandi, at tað er ikki ov nógv sagt, at Strandferðslan er meginlívæðrin í samfelagnum. Eins og aðrir stovnar hevur hesin stovnur avmarkaðar fíggjarkarmar at halda seg innan fyri. Men ynskja politikararnir at liva upp til ynski og krøvi teirra til henda stovn, so eru teir eisini noyddir til at geva honum tann pening, sum honum tørvar fyri at kunna veita eina tænastu, sum somu politikarar ynskja/krevja.

VIT teljast millum teirra, sum halda, at hesin stovnurin framhaldandi eigur at vera almennur. Á sama hátt sum heilsuverkið eigur at verða alment og fyri øll. Tørvurin á einum optimalum samferðslukervi er so stórur, at vit nøkta hann ikki, um tað privata hevði fingið hesa uppgávu at røkja. Men vit meta eisini konstruktivan kritikk at vera part av menningini av Strandferðsluni við teimum lýtum, sum stórir og tungir almennir stovnar altíð vilja hava. Ein týðandi deild undir hesum stovni er Farstøðin, sum m.a. skal kunna brúkaran um ferðaætlan og broytingar í ferðaætlan ol. Tá fólk frá Sosialinum skuldi til Klaksvíkar kvøldið fyri nýggjársaftan varð ringt á Farstøðina í Havn, og har vóru boðini, at seinasti túrur úr Lorvík var klokkan 20.50. Farstøðin gloymdi bara at siga frá, at broyting varð gjørd í ferðaætlanini, soleiðis at hesin túrurin varð tikin av skránni. Og við sviðusoð vóru teir mongu bilførararnir og fólk annars, ið ikki høvdu lagt til merkis lýsing í bløðunum um broyting í ferðaætlanini. Umframt at upplýsingin av Farstøðini var skeiv, so varð broytingin í ferðaætlanini heldur ikki skrásett á tekstvarpinum.

SLÍKT eigur ikki at henda. Slíkt skal pplýsingartænastan forða fyri. Hon er ein týðandi partu av einum slíkum brúkarastovni sum Strandferðsluni. Tað má ikki henda, at hon gevur skeivar upplýsingar. Hetta er skrivað í bestu meining og sum ein áminning til stovnin um at bøta uppá tey viðurskifti, sum halta. Hetta skal ikki skiljast sum ein niðurgerð av teimum mongu fólkum, sum starvast hjá Strandferðsluni. Tey gera eitt gott arbeiði. Men tað er bæði rætt og rímuligt at gera vart við manglar og brek, og tað skal tí eisini vera vón okkara, at informatiónsparturin av SL fæst at virka optimalt í komandi tíðum.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Áheitan á býráðið fyri Tórshavnar kommunu

Onkur mundi ivaleyst stúrsa við, tá ið honum var hyggjandi í Dimmalætting fyri leygardagin 8. januar 2000 og á blaðsíðu 11 sá eina hampuliga stór »trøð« á Argjum verða lýsta til sølu.

Í lýsingini verður greitt frá, at talan er um tríggjar lutir, og at tann minsti luturin er ætlaður til veg - tað man vera partur av lendinum til vegin út á Glyvursnes.

Í sambandi við hesa ætlaðu søluevði ikki verið løgið, um onkur dró søguna um hetta vælsignaða traðarstykkið fram aftur í ljósið, tí hvussu ber tað til, at lendi, sum Argja kommuna í sínari tíð fekk keypt frá Jarðargrunninum til komunal endamál, nú verður selt á »fría marknaðinum«, um nøktandi boð gevst?

Áheitan mín á býráðið snýr seg um at liggja framvið og royna at fáa lendið aftur til kommununa fyri ein rímuligan prís, tí tað verður so avgjørt brúk fyri tí í komandi tíð. Eingin er so blindur, at hann dugir ikki at síggja tað. Kann t.d. nevna, at skúlin á Argjum er alt ov lítil, og barnatalið veksur skjótt. Sethúsabyggingin uppi á Hamri gongur við ferð, og sjálvandi eiga hesi ungu foreldur børn, men hvar skulu tey fara at ganga í skúla?

Tá ið byggilendið á Hamri er bygt, man tá ikki verða farið suðureftir, tí har er ikki minni gott lendi? Alt talar fyri, at tað verður fólkavøkstur hesumegin Sandá.

»Trøðin« fer eisini at liggja stak væl fyri til møguliga onnur almenn endamál, tá ið ringvegurin einaferð verður bundin í Reynsgøtu.



**Argjum, 9. januar 2000**
**Heilsan og gott nýggjár**
**Regin av Steinum**

# Tíðindaloysi/agurkutíðir í sjónvarpinum

Undirritaði fer at gera ein stutta viðmerking til innslagið hjá Boga Gotfred í sjónvarpinum (SvF) fríggjakvøldið tann 8. januar 2000, har hann í høvuðsyvirskriftini legði meg undir ikki at akta landsstýrismannin. Hetta er so mikið álvarslig ákæra at seta móti mær, at hon ikki kann standa uttan viðmerkingar:

Strandfaraskip Landsins hava seinastu mánaðirnar arbeitt við einari tøkniligari og umsitingarligari umskipan av ferðaseðlaskipanini. Bakgrundin fyri hesari umlegging er at skapa eina skipan, sum eftirlitsmyndugleikar okkara kunnu góðtaka og fyri at gera eina skipan, sum er rættvís og til gagns fyri kundarnar/borgararnar.

Tað, sum síðan hendir er, at landsstýrið ynskir at steðga eitt sindur á við hesum broytingum og fráboðar hesum í skrivi til Strandfaraskip Landsins dagfest tann 13. desember 1999. Mælt verður til, at vit taka upp samband við Undirvísingar- og Mentamálastýrið fyrst, um ferðing hjá teimum lesandi.

Uppá hetta tíðspunkt, t.e. um miðjan desember, er brúkt stór orka at broyta skipanina og tí tekur tað nakað av tíð at broyta prísin aftur til tann gamla. Spurningurin er eisini, hvussu hetta kann gerast tekniskt og í aðrar mátar soleiðis, at meginreglurnar í prísskipanini ikki verða broyttar. Viðmerkjast skal, at hesar umskipanir verða gjørdar í samskifti í Vinnumálastýrið.

Fríggjadagin tann 8. januar 2000 verður undirritaði uppringdur av SvF, att. Boga Gotfred, sum vísir á, hví vit ikki hava gjørt eftir boðunum frá landsstýrinum, sum longu í november skal hava fráboðað okkum at steðga á við broytingunum og hevur hann dømir uppá, at vit um jólini hava selt dýrari ferðaseðlar til lesandi. Tað, sum eg svari honum aftur er, at broytingarnar eru gjørdar viðvíkjandi mánaðarkortunum til lesandi, men at eg ikki uppá standandi fót kann svara uppá tey einstøku dømini hann vísi rtil. Síðani greiddi eg honum eitt sindur frá um bakgrundina fyri hesum broytingum og um hesar umleggingar.

Hetta varð hann als ikki áhugaður í, søgan skuldi verða, at eg vildi ikki gera eftir boðum úr Tinganesi. Sum hann málbar seg yvirfyri leiðaranum á fólkaflutningsdeildini, at hann vildi ikki verða innsmurdur í, hvørjar fyrimunir og vansar talan var um, men at málið handlaði fyri hann um, hvørt vit høvdu gjørt eftir boðum úr landsstýrinum ella ikki. Til hetta kann viðmerkjast, at sum starvssettur á einum almennum tíðindastovni, skuldi hann havt áhuga í at borið fram sakligan tíðindaflutning o.a., og annars víst á samanhang, sum hava týdning fyri at viðgera eitt mál sum hetta. Men í hesum føri hevði allar sakligar frágreiðingar oyðilagt søguna.

Tað, sum veruliga er hent frá okkara síðu av er, at broytingarnar við teimum einstøku ferðaseðlunum dróg nakað út partvíst orsaka av einari misskiljing og partvíst, tí tað tekur umleið eina viku at fáa nýggj modulir í umfar runt landið (120 stykkir), meðan mánaðarkortini til lesandi vórðu broytt beinanvegin. Hesir trupulleikar merkja ikki, at undirritaði noktar at fylgja fráboðanini frá landsstýrinum.

Fyri meg er tað ikki ein spurningur um at akta (børn/foreldur), men ein spurningur um, sum partur av einari skipan við reglum og mannagongdum, at gera eftir einari fráboðan, sum er komin frá landsstýrismanninum, og tað meti eg meg at hava gjørt. Í hesum málinum, sum í øðrum týðandi málum, havi eg eisini havt eitt neyvt samskifti við Vinnumálastýrið.

Vónandi hevur hyggjarin og SvF við hesari stuttu viðmerking fingið eina greiðari fatan av samanhanginum í hesum málinum.



**Reidar Nónfjall,**
**stjóri á Strandfaraskipum Landsins**

# Stjóri á Føroya Kærustovni

Sagt verður frá, at Gurið Joensen er sett í starv sum stjóri á Føroya Kærustovni.

Gurið Joensen er 35 ára gomul og er útbúgvin løgfrøðingur.

Eftir lokna útbúgving hevur hon arbeitt sum fulltrúi á samskiftisdeildini á Landsskrivstovuni, sum fulltrúi í Líkningarráðnum og sum deildarleiðari á løgdeildini í Toll- og skattstovuni. Eftir hetta arbeiddi hon sum advokatfulltrúi í 2 ár og sum advokatur í 1,5 ár. Síðani juni 1998 hevur hon starvast sum løgfrøðingur á Føroya Kærustovni har hon frá 1. apríl 1999 hevur virkað sum settur stjóri.



# Takka fyri stuðul til skannaran

Vit, ið tóku stig til Landsinnsavningina til kálkskannaran á Landssjúkrahúsinum í nov. 99, vilja við hesum takka hjartaliga øllum teimum, sum stuðlaðu tiltakinum. Sum kunnugt kom allur peningurin inn, og kekkurin varð handaður Landssjúkrahúsinum 3. des. 99.

Enn einaferð takk og gott nýggjár.

**Stigtakararnir**



# Javnaðarflokkurin við í fullveldismálinum

*Eftir kaffifundirnar millum samgonguna og Javnaðarflokkin skilja partarnir betur hvønn annan. Javnaðarflokkurin útilokar ikki møguleikanum fyri semju*

JOHN JOHANNESSEN

– Møguleikin fyri, at vit standa aftanfyri eitt samráðingarupplegg til donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya er í prinsippinum ikki útilokaður.

Hetta sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, nú tíðin fer at nærkast til málið um ríkisrættarligu støðu Føroya verður beint í uttanlandsnevndina.

Javnaðarflokkurin hevur verið til tveir óformellar fundir við landsstýrissamgonguna um fullveldisætlanina, og sambært formanni floksins hevur talan verið um nakrar ógvuliga gevandi fundir.

**Væl og virðiliga viðgjørt**

Jóannes Eidesgaard sigur fullveldismálið vera væl og virðiliga viðgjørt á sokallaðu kaffifundunum.

– Vit hava verið gjøgnum alt málið og hava gjøgnumgingið alla prosessina, sum hon er. Hetta hevur havt við sær, at partarnir nú skilja støðuna hjá hvørjum øðrum. Tað er ikki longur soleiðis, at samgongan ikki veit, hvat Javnaðarflokkurin vil, og at Javnaðarflokkurin ikki veit, hvat samgongan vil.

Jóannes Eidesgaard vísir í sama viðfangi á, at talan hevur verið um tos tvørtur um borðið í orðsins rætta týdningi. Einki skrivligt tilfar hevur verið at sæð, og tískil hevur Javnaðarflokkurin ikki sæð nakað samráðingarupplegg ella brot úr nøkrum samráðingaruppleggi. Heldur ikki hava partarnir kjakast um sjálvt samráðingaruppleggið.

**Bíða eftir fundarboðum**

Formaður Javnaðarfloksins sigur, at seinasti fundurin millum samgonguna og Javnaðarflokkin var fyri jól, og nú situr Javnaðarflokkurin bara og bíðar eftir fundarboðum frá samgonguni.

Fundurin fyri jól var sambært Jóannesi Eidesgaard ógvuliga avklárandi, og er hann tí spentur uppá, um flokkurin fær at vita um samráðingaruppleggið ella partar av tí á næsta fundi.

Javnaðarflokkurin bíðar eftir fundarboðum, og sum skilst á Høgna Hoydal, landsstýrismanni, gongur ikki long tíð áðrenn Javnaðarflokkurin fær hesi fundarboð. Men Høgni Hoydal vísir á, at Javnaðarflokkurin ikki skal vænta sær at síggja nakað samráðingarupplegg. Hetta er nevniliga í stríði ímóti fólkaræðisligu viðgerðini, tí sambært henni, skal samráðingaruppleggið bert viðgerast í uttanlandsnevnd løgtingsins, hagar fullveldismálið verður beint, so skjótt sokallaða politiska prosessin millum samgonguna og Javnaðarflokkin er liðug.

**Léttari viðgerð í uttanlandsnevndini**

Bæði Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard eru samdir um, at fundirnir millum samgonguna og Javnaðarflokkin fara at gera viðgerðina av málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya léttari í uttanlandsnevndini.

Javnaðarflokkurin er opin fyri møguleikanum fyri einari breiðari semju áðrenn samráðingarnar, men hetta hongur saman við, hvat innihaldið í samráðingaruppleggingum er. Tað veldst nevniliga um, hvussu langt farið verður.

– Verður talan um eina skipan í einum felagsskapi, so er møguleiki fyri, at vit kunnu stuðla, men verður talan um eina skipan uttanfyri, so er Javnaðarflokkurin eisini uttanfyri, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard útlilokar ikki møguleikanum fyri, at Javnaðarflokkurin fer at taka undir við samráðingarupplegginum um ríkisrættarligu støðuna*

# Altíð trúð uppá breiða semju

*Høgni Hoydal sigur allatíðina hava trúð uppá, at tað fer at eydnast at fáa breiða semju í málinum um ríkisrættarligu støðuna*

JOHN JOHANNESSEN

– Fundirnir um ríkisrættarligu støðuna hava verið ógvuliga góðir. Javnaðarflokkurin og samgongan skilja nú hvønn annan, og møguleikin fyri einari semju er til staðar.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, er fegin um úrslitið av fundunum, ið hava verið millum landsstýrið og andstøðuflokkarnar og millum landsstýrið og samgonguumboðini í uttanlandsnevndini um ríkisrættarligu støðuna.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum sigur seg allatíðina, síðani skjøtil varð settur á fullveldisætlan landsstýrissins, hava trúð uppá, at tað fer at eydnast at fáa eina breiða politiska semju í lag um málið.

**Tekniski parturin liðugur**

Sum Sosialurin skrivaði í gjár, er politiska prosessin, um at vera liðug. Tó ætlar samgongan sær at enda politisku prosessina á ein góðan hátt, áðrenn málið fer í uttanlandsnevndina. Hetta verður millum annað gjørt við meira fundarvirksemi við Javnaðarflokkin.

Javnaðarflokkurin sleppur ikki at síggja nakað samráðingarupplegg, áðrenn málið kemur fyri uttanlandsnevndina, men sum skilst á Høgna Hoydal, eru allar tær teknisku fyrireikingarnar til samráðingaruppleggið liðugt fyrireikaðar. Tað vantar bert at orða sjálvt uppleggið, og verður hetta gjørt tá politiska prosessin er liðug.

Orsøkina til, at eingin sleppur at síggja partar av samráðingarupplegginum áðrenn tað fer í uttanlandsnevndina, sigur Høgni Hoydal vera, at hetta stíðir ímóti demokratisku prosessini. Allir flokkar skulu hava somu møguleikar at viðgera málið í uttanlandsnevndini.

**Samráðast í mars**

Í Sosialinum í gjár segði formaðurin í uttanlandsnevndini, Hergeir Nielsen, at hann væntaði sær at fáa málið um ríkisrættarligu støðuna til viðgerðar um eina til tvær vikur. Hann segði seg vænta eina góða viðgerð í uttanlandsnevndini, men segði seg tó ikki kunna meta um, hvussu drúgv viðgerðin fer at verða. Men hann legði dent á, at nevndin fer at byrja viðgerðina, so skjótt málið er henni í hendi.

Fær uttanlandsnevndin málið innan tvær vikur og varir viðgerðin umleið ein mánað, kunnu vit vænta, at landsstýrið fer til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina einaferð í mars.

Tað hevur verið frammi, at danska stjórnin ynskir fýra vikur at fyrireika seg til samráðingarnar í, eftir at samráðingaruppleggið er liðugt frá føroyskari hond. Tí kunnu vit meta okkum fram til, at samráðingarnar byrja einaferð í seinnu hálvu av mars, verður uttanlandsnevndin liðug at viðgera málið um hálvan februar.

Høgni Hoydal vil einki siga um, nær væntast kann, at samráðingarnar byrja. Hann sigur hetta vera nakað, ið fjølmiðlarnir og onnur sjálvi kunnu meta um, men hann ásannar, at tað fer ikki at ganga so ógvuliga long tíð til farast kann til Danmarkar at samráðast.



*Høgni Hoydal sigur seg altíð hava verið fulvísan í, at tað fer at eyndast at fáa eina breiða semju í lag um rískisrættarligu støðuna*

**Trupulleikarnir loysast undir samráðingunum**

Høgni Hoydal vísir á, at tað ikki nyttar at heingja seg ov nógv í, hvussu fíggjarliga støðan fer at verða, hvussu rættartrygdin verður, hvussu vit kunnu samstarva við Danmark um útbúgvingar og so framvegis áðrenn vit yvirhøvur eru farin undir samráðingar við Danmark um ríkisrættarligu støðuna.

– Hetta eru alt mál, ið verða loyst undir samráðingunum við donsku stjórnina og ikki áðrenn. Tað nyttar jú einki at ganga og rópa upp um samráðingarkrøv langt áðrenn samráðingarnar.

Høgni Hoydal vísir á, at vit føroyingar ikki skulu til Danmarkar til ein fótbóltsdyst, har tað er avgerandi, hvussu nógv gul og reyð kort hvørt liðið fær. Heldur ikki er avgerandi, um vit vinna 10 - 0 ella 1 - 0. Vit skulu bara vinna, staðfestir hann.

Og Høgni Hoydal væntar, at Føroyar fara at vinna, verður farið til samráðingar við breiðari politiskari semju. Hann vísir á, at Føroyar tá standa við einum sterkum liðið ímóti minnilutasjórnini hjá Nyrup.

Fishing 2000
March 30, 31 – April 1
Glasgow * Scotland

AQUA CULTURE INTERNATIONAL 2000
March 30, 31 – April 1
GLASGOW * SCOTLAND

*BEINLEIÐIS TIL GLASGOW VIÐ ATLANTIC AIRWAYS*

**Úr Vágum mikudagin 29. mars kl. 1730 og heimaftur leygarkvøldið 1. apríl**

**Kostnaður pr.pers. úr:** **kr. 7.255,- á eink.kamari**
**kr. 6.780,- á dup.kamari**

**Íroknað:**
* Flogferð báðar vegir, írokn. øll ferðaavgjøld
* Bussflutningur í Glasgow av flogvølli til hotellið og aftur
* Innivist í Glasgow, 3 nætur, á fyrsta floks hotelli íroknað morgunmat

**www.travel.fo**

***Faroe Travel***
**tlf. 31 26 00**